## Fremad Amager vann aftur

Tað gongur væl hjá Fremad Amager í donsku 2. deild. Um vikuskiftið tóku teir ímóti BSV, og annan dystin á rað eydnaðist tað hjá Fremad Amager at vinna dystin. Eftir eitt gott korter legði nýggi málrevurin hjá Fremad Amager, Anders Jochumsen, heimaliðið á odda, men tað gingu bert 10 minuttir, so javnaði BSV. Gleðin var tó stokkut, tí fýra minuttir seinni var sami Jochumsen upp á spæl og skoraði til 2-1, sum eisini var hálvleiksstøðan. Í seinna hálvleiki sat Fremad Amager á øllum, men fleiri mál komu ikki í dystinum, sum Fremad Amager sostatt vann 2-1. Við sigrinum hava teir fult stigatal eftir tveimum dystum.



## Ajax vann Super Cup

Hollendska Super Cup, sum er dysturin millum meistararnar og steypavinnararnar, var á skránni um vikuskiftið, tá Ajax Amsterdam tók ímóti PSV Eindhoven. Og liðið úr Amsterdam vísti enn einaferð, at teir hava sera gott tak á PSV. Ajax vann nevniliga dystin 1-0 við máli, sum spanski Gabri skoraði í fyrra hálvleiki, og hetta er triðja árið á rað, at Ajax vinnur Siper Cup finaluna ímóti júst PSV.

# Meistararnir skuffaðu á heimavølli

**Fyrsta umfarið í ensku Premier League hevur verið um vikuskiftið, og mest óvæntaða úrslitið kom á Old Trafford, har meistararnir úr Manchester United bert fingu javnleik ímóti Reading**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið kom tíðin, sum ivaleyst nógvir føroyskir fótbóltsfjepparar hava bíðað eftir í á leið tríggjar mánaðir, tá fyrsta bólturin í nýggja kappingarárinum í Premier League fór á rull.

Spurningarnir hava helst verið nógvir undan kappingarbyrjan, og eftir fyrsta umfarið er sjálvandi ilt at spáa um, hvørji lið fara at kappast um meistaraheitið, hvørji fara at liggja í tyngra endanum, hvør fer at gerast toppskjútti osv. Men fyrsta umfarið kann tó geva ymiskar ábendingar um nøkur ting, og soleiðis var eisini hetta vikuskiftið.

### Kiksaði hjá United

Meistararnir úr Manchester United løgdu fyri við eini á pappírinum yvirkomiligari uppgávu á heimavølli ímóti Reading, men hetta bleiv tó als ikki nøkur løtt uppgávu. Manchester United sat á at kalla øllum dystinum, men Reading bardist manniliga fyri at halda javnleikin.

Undan steðginum hevði United fleiri málmøguleikar, men teir høvdu ringt við at fáa bóltin í málið. Ta einu ferðina var sera tætt við, tá Ryan Giggs heilfluktaði bóltin á stongina.

Í seinna hálvleiki helt United fram við at trýsta, men í málið vildi bólturin ikki. Tá so Kitson hjá Reading fekk beinleiðis reytt kort við góðum korteri eftir at leika, øktist trýstið enn meir á málið hjá Reading. Verjan hjá Reading megnaði tó at stríða seg fram til ein málleysan javnleik, og sostatt byrjaði nýggja kappingarárið einki serligt hjá meistarunum.

Hjá hinum trimum liðunum, sum væntandi fara at stríðast um meistaraheitið saman við Manchester United, gekst heldur betri. Chelsea vann ein undirhaldandi dyst á heimavølli 3-2 ímóti Birmingham. Liverpool vann 2-1 á útivølli ímóti Aston Villa. Sigursmálið fingu teir í síðstu minuttunum, tá Gerrard sendi eitt fríspark beinleiðis í netið. Og Arsenal megnaði við tveimum málum í síðstu sjey ella átta minuttunum at venda einum hóttandi 1-0 tapi til ein 2-1 sigur á heimavølli ímóti Fulham.

### Debutsigur til Eriksson og Allardyce

Bæði Newcastle og Manchester City hava fingið nýggjan venjara undan nýggja kappingarárinum, og her er ikki talan um ein og hvønn. Manchester City hevur fingið fyrrverandi enska landsliðsvenjaran, Sven Göran Eriksson, at standa á odda fyri teirra liði, meðan Sam Allardyce, sum hevur verið venjari hjá Bolton í samfull átta ár, nú er venjari hjá Newcastle.

Og júst nevndi Allardyce skuldi byrja nýggja kappingarárið á útivølli ímóti gamla felagnum, Bolton. Her fekk hann eina dreymabyrjan, tá Newcastle eftir bert 27 minuttum høvdu lagt seg á odda 3-0 við tveimum málum frá Martins og einum frá N'Zogbia. Í seinna hálvleiki fekk Bolton pyntað um úrslitið við máli frá Anelka, men Newcastle vann dystin 3-1.

Eisini Eriksson og hansara Manchester City fingu eina góða byrjan, tá teir møttu West Ham á útivølli. Eriksson hevur styrkt sær nógv um liðið til hetta kappingarárið, og tað vóru tveir av nýggju monnunum, sum skoraðu málini fyri City. Í 18. minutti legði Rolando Bianchi Manchester City á odda, og hesa leiðsluna hildu teir til fýra minuttir fyri tíð, tá innskifti Geovanni avgjørdi dystin.

### Góð byrjan hjá uppflytarunum

Í fyrsta dystinum í ársins Premier League tóku uppflytararnir úr Sunderland ímóti Tottenham, sum miðar høgt í ár. Men Tottenham fekk eitt ordans skot fyri bógvin, tá innskifti Michael Chopra skoraði einasta málið í dystinum í 93. minutti. Sostatt hava Roy Keane og hansara fult stigatal eftir fyrsta dystin.

Hjá einum av hinum uppflytarunum, Derby, gekst heldur ikki so galið. Teir tóku ímóti Portsmouth, og hesin dysturin endaði við 2-2 javnleiki. Oakley legði Derby á odda alt fyri eitt, men um miðjan fyrra hálvleik javnaði Mwaruwari fyri Portsmouth. Tá sjey minuttir vóru eftir av dystinum sá út til, at Portsmouth fór at vinna, tá Utaka sendi bóltin í netið, men minuttin aftan á javnaði Andy Todd fyri Derby, og sostatt endaði dysturin við 1-1 javnleiki.

Einasti uppflytarin, sum ikki fekk stig, var Birmingham. Teir høvdu tó heldur ikki nakran lættan dyst, tá teir vitjaðu hjá Chelsea á Stamfor Bridge. Dysturin endaði við 3-2 sigri til Chelsea, men Birmingham var væl við í hesum sera undirhaldandi dystinum.



*Manchester United fekk bert 0-0 á heimavølli ímóti Reading í fyrsta dystinum í ár, og harafturat bleiv Wayne Rooney álvarsliga skaddur. Hann verður væntandi úti í á leið tveir mánaðir.*
*Mynd: Polfoto*

### Úrslit frá Premier League

Sunderland – Tottenham 1-0

Bolton – Newcastle 1-3

West Ham – Manchester City 0-2

Derby – Portsmouth 2-2

Middlesbrough – Blackburn 1-2

Everton – Wigan 2-1

Aston Villa – Liverpool 1-2

Arsenal – Fulham 2-1

Chelsea – Birmingham 3-2

Man Utd – Reading 0-0

# Rooney álvarsliga skaddur

**Enski landsliðsáleyparin hjá Manchester United, Wayne Rooney, mátti lata seg skifta út í hálvleikinum í dystinum ímóti Reading um vikuskiftið, og nú er greitt, at Rooney má binda frið í tveir mánaðir**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Stutt undan hálvleiksteðginum í dystinum millum Manchester United og Reading í gjár, fekk enski landsliðsáleyparin hjá United, Wayne Rooney ein skaða í fótin. Verjuleikarin hjá Reading, Michael Duberry, skuldi verja fyri einum skoti frá Rooney, og ótilvitað rakti hann fótin hjá Rooney, sum small í vøllin. Rooney fekk spælt dystin til hálvleiks, men tá liðini komu inn aftur til seinna hálvleik, var eingin Wayne Rooney at síggja.

Eftir hendingina bleiv Rooney sendur beinleiðis til kanningar, og hesar bóru ikki góð boð frá sær. Sjálvt um læknarnir ikki enn kunnu staðfesta akkurát, hvat er galið, so er líkt til, at Wayne Rooney má binda frið í upp til tveir mánaðir.

Hóast sín unga aldur, so er hetta ikki fyrsti álvarsligi skaði, sum Wayne Rooney fær. Tvær ferðir áður hevur hann roynt at brotið eitt lítið bein inn í fótinum, sum í báðum førum hevur hildið hann burtur frá fótbólti í eina tíð.